# Friðarligt í vikuskiftinum

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Um meginpartin av landinum hevur verið rættiliga friðarligt í vikuskiftinum.

Mánamorgunin hevði vakthavandi á politigarðinum ikki nógv at fortelja Sosialinum.

Vikuskiftið hevur verið stak friðarligt. Onki óvanligt ella stórt er hent í Havnini um vikuskiftið. Onkur rútur brotin, men onki meira enn tað.

So kanska eitt heldur óvanligt vikuskifti í Havnini nú um dagar.

Í Klaksvík hevur eisini verið friðarligt um vikuskiftið. Eitt sjáldsama friðarligt vikuskifti, sigur vakthavandi á politistøðini í Klaksvík.

Eitt lítið ferðsluóhapp hevur verið, men tey eru væntandi nú frostið kemur.

Sunnukvøldið skuldi ein bilur í Klaksvík snara í einum svingi, men bilurin fer beint frameftir ístaðin. Hetta førdi við sær, at bilurin rendi inn í ein annan parkeraðan bil. Ongin stórvegis skaði stóðst av óhappinum.

Í Eysturoynni var heldur ikki nógv at fortelja. Nøkur ferðsluóhapp hava tó verið. Leygarnáttina rendi ein bilur á bilverjuna við rulliportrið í Skálabotni, og somu nátt var ein tikin fyri at koyra ávirkaður.

Í Gøtugjógv rendi ein bilur, sum var á veg suðureftir gjøgnum bygdina, á ein lyktapela. Førarin hevði mist tamarhald á bilinum í eini hvirlu, men ongin fólkaskaði var.

Mánanáttina fór ein bilur útav uttanfyri Fuglafjørð vegna hálku, og ein annar fór útav undir Gøtueiði, Tjørunesi – eisini vegna hálku. Bilurin bóltaði oman í bøin, ongin mannaskaði, bert skrokkskaði, veit vakthavandi á politistøðini í Runavík.

Sera friðarligt hevur verið kring landið hetta vikuskiftið.

# Stjólu rifflur, høglbyrsu og pistól

INNBROT
*Ingrid Bjarnastein*

Náttina til sunnudagin var eitt innbrot í einum grønlendskt skrásettum skipi, sum liggur á Miðvági. Hetta er eitt gamalt skip, ein sokallaður politikuttari, sum ein miðvingur hevur tikið við sær úr Grønlandi.

Nakrar rifflur, ein høglbyrsa og ein pistól vórðu stolnar av skipinum Malik, sum í fleiri ár hevur ligið á Miðvági. Eisini ein rúgva lóðri til vápnini varð stolið, og er tað júst hetta, ið er vandamikið, um vápnini fella í skeivar hendur, sigur Regin Jespersen á politistøðini í Miðvági. Hví vápnini vóru umborð á skipinum veit Regin Jespersen ikki at siga, men verður hetta kannað í løtuni.

Enn veit politiið ikki at siga, hvør stendur aftanfyri innbrotið, men málið verður sjálvsagt kannað.

Politiið í Miðvági heitir á fólk, ið møguliga vita okkurt um innbrotið, at venda sær til teirra, tí tað kann gerast ikki sørt vandamikið við løddum vápnum.

Um nakar veit nakað er at ringja á telefon 333448, og kann hetta eisini gerast anonymt.

# Leitingin loyst seg

*Eyðun Elttør fegnaðist um lógarverkið í samband við oljuleit-ingina undir Føroyum*
*Mynd: Edvard Joensen*



**Oljuleitingin undir Føroyum hevur lagt ítøkiligar inntøkur eftir seg, segði Eyðun Elttør, landsstýrismaður á landsfundi Sjálvstýrisfloksins**

LANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*

**Klaksvík:** Lóggávan í samband við oljuleitingina hevur gjørt, at pengar eru komnir til landið, eins og vit hava fingið nógvar royndir, vit kunnu brúka seinni, segði landsstýrismaðurin.

Hann metti tað vera rætt at krevja, at alt skal um føroyskan bryggjukant, tí tað hevur givið okkum vinning, sum vit annars ikki høvdu fingið.

Høvdu vit ikki havt hesa lóggávuna, var vandi fyri, at vit als einki fingu. Hvørki vinning ella tær royndir, okkara fólk hóast alt hava fingið, segði hann.

Um umhvørvis mál segði hann, at vit tíverri hava gjørt ov lítið við Agenda 21 ætlanina, sum samtykt varð á Rio fundinum í 1992.

Men nú er komin ein nýggj ætlan, sum nevnd verður Lokal Agenda 21, har lagt verður upp til, at kommunurnanr sjálvar fara at taka umhvørvismálini upp.

Hann vísti á, at eitt nú Noreg og Svøríki hava gjørt nógv burtur úr málinum, og tað eiga føroyingar eisini at taka upp.

# Sam sigla um Leirvíksfjørð

**Sam kann loysa part av trupulleikanum um Leirvíksfjørð heldur enn at keypa eitt skip afturat**

LANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*

**Klaksvík:** Tað er ikki neyðugt at keypa avloysaraskip til Leirvíksfjarðarleiðina. Tað er bara at seta Sam í siglingina har, segði Sámal Petur í Grund á landsfundinum hjá Sjálvstýrisflokkinum.

Tað var Karl Heri Joensen úr Klaksvík, sum á landsfundinum hevði at tingmanning floksins fyri ikki at taka undir við broytingaruppskotinum hjá Vilhelmi Johannesen, tá eykajáttanarlógin fyri september var fyri. Tað var har, hann skeyt upp at keypa avloysaraskip til Strandferðsluna at sigla um Leirvíksfjørð.

Sámal Petur í Grund svaraði, at hann hevði hoyrt norðoyartingmenn tosað um, at tað var ikki neyðugt at keypa nakað skip, tí Sam kundi brúkast til endamálið. Hann er avloysaraskip kortini.

Men tað hevði landsstýrismaðurin við vinnumálum ongantíð biðið um, segði Sámal Petur í Grund. Hann segði, at tað komst partvís av mótstøðu frá Strandferðsluni og manningin sjálvari, segði hann.

Hann metti samstundis, at Sam eisini kundi verið nýttur at sigla í Kallsoynna við.

Men tí var Schumann Hansen úr Kaksvík ikki samdur við honum í.

– Tað er stutt og greitt einki atløgupláss, sum Sam kann brúka á Kallsoynni, segði hann.

Hann helt tað vera rættast at leiga eitt avloysaraskip, til Ternan verður leys av Vestmannasundi, tá undirsjóvartunnilin kemur vestur í Vágar. So kunnu Ternan og Dúgvan í felag røkja siglingina um Leirvíksfjørð. Tað metti hann vera ta frægastu loysnina.

# Sjey fólk sagt upp á Faroesoft

UPPSØGN
*Ingrid Bjarnastein*

Fyritøkan, ið fyrr æt Sp/f VIT, men sum í dag kallar seg Faroesoft hevur mist sjey av starvsfólkum sínum. Sjey av 11 starvsfólkunum hjá fyritøkuni hava sagt seg úr starvi.

Tað hevur verið heldur torført at fáa nakra viðmerking um uppsagnirnar, men Rolf Herup Olsen, virkismenningarleiðari á Farodane, váttar tíðindini, men hann hevur onga víðari viðmerking um málið sum nú er.

Faroesoft er nevniliga eitt Farodane-felag, tí í ár 2000 keyptu teir 80% av partapeninginum í Farosoft, meðan starvsfólkini á fyritøkuni nú eiga hini 20%.

Roynt hevur verið at fingið eina viðmerking frá starvsfólkunum á Faroesoft, men heldur ikki tey hava nakað at siga um uppsagnirnar í løtuni.

Óli Olsen, stjóri á Faroesoft, var staddur uttanlands tá blaðið varð skrivað, so heldur ikki hann hevur havt nakran møguleika at úttala seg um málið.



# Eingin loysingarflokkur



*Sámal Petur í Grund er nýggjur galliónsfigurur hjá Sjálvstýrisflokkinum, meðan Helena Dam á Neystabø er farin longri aftur*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Tað verða ongar avgerandi broytingar í politikki Sjálvstýrisfloksins eftir formansskiftið, sigur nýggi formaðurin, Sámal Petur í Grund. Kósin verður hólig tjóðskaparsinnað, og allar dyr standa opnar fyri samstarvi**

LANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*

**Klaksvík:** Sjálvstýrisflokkurinfer at arbeiða eftir stevnuskránni, sum samtykt er. Tað verður eingin radikal broyting, hóast formaðurin er skiftur út. Og nýggi formaðurin letur allar dyr standa opnar fyri samstarvi.

Í viðmerking til tað, formaðurin í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard førir fram í Sosialinum, at Sjálvstýrisflokkurin fær verri við at samtarva, nú formansskifti hevur verið, sigur Sámal Petur í Grund, formðaur Sjálvstýrisfloksins, at so verður ikki.

–Tað verða ongar broytingar at merkja í linju floksins, sigur hann. Flokkurin hevur sína stevnuskrá at arbeiða eftir, og hana fer hann at halda seg til.

At hansara persónliga politiska linja skal vera meira loysingarsinnað og høgravend, enn flokkurin hevur verið fyrr, er einki hald í, sigur hann.

–Eg havi ongantíð verið loysingarmaður, men tjóðskaparsinnaður. Var eg loysingarmaður, hevði eg farið upp í annan flokk, sigur Sámal Petur í Grund.

Um samstarvsmøguleikar eftir komandi løgtingsval, sigur hann at enn sum áður standa allar dyr opnar nfyri samstarvi.

Sámal Petur í Grund heldur ikki, at formansskiftið í Sjálvstýrisflokkinum, sum gjørdist heldur knappligt beint upp undir landsfundin, fer at ávirka støðu floksins nevnivert.

Hann óttast als iki fyri, at hann hevur grivið egna grøv við at troðka Helenu Dam á Neystabø av ovastu rók.

–Tað havi eg ikki gjørt, sigur hann, Eg brúkti mín demokratisak rætt - eftir áheitan - at stilla upp til formansvalið. At mótvalevnið ikki vildi fara undir eitt stríðsval, kann eg einki gera við, sigur hann.

Sámal Petur í Grund heldur ikki, at tað er nakar trupulleiki fyri Sjálvstýrisflokkin, at formaðurin og starvsnevndin standa fyri vali á hvørjum ári. Landsnevndin verður vald í tveimum annaðhvørt ár. Helvtin hvørja ferð.

Demokratiið verður bara ein trupulleiki, tá annað av valevnunum ger tað til ein trupulleika, vísir hann á.

At veljarakanningar, sum gjørdar hava verið, geva Sjálvstýrisflokkinum afturgongd, órógvar ikki nýggja formanin so øgiliga nógv. Hann vísir á, at tær leggja flokkin bara heilt stutt frá tveimum tinglimum, sum hann metir, flokkurin eigur at fara at fáa, um val verður arbeitt.

At annar veðrur valdur í Eysturoynni, er hann ivaleysur í, tí Eysturoyggin til seinasta val var størsta valdømið hjá flokkinum. At tann, sum valdur verður, verður hann sjálvur, liggur líkasum millum relgurnar, skilst.

Sámal Petur í Grund er ikki bangin fyri, at tað, sum nú er hent, kann fara at geva bakslag, soleiðis at fólk fara at savnast um fráfarandi formannin við eitt løgtingsval.

Møguleiki er fyiri at eitt komandi fólkstingsval fer at geva Sjálvstrýisflokkinum afturgongd í mun til seinasta fólkatingsval, sum av ávísum orsøkum var heilt gott hjá Sjálvstýrisflokkinum.

Ein lemjandi afturgongd kann tulkast sum eitt mótmæli móti nýggja formanninum. Selriga tá fráfarnadi formaðurin hevur boðað frá, at hon stillar ikki upp til eitt møguligt fólkatingsval.

Sámal Petur í Grund ásannar, at tað ber til at hugsa so, men at hann er ikki bangin fyri, at tað fer at verða soleiðis.

Hann tekur aftur í aftur, at við nýggju skipanini at velja formann og starvsnevnd hvørt ár, er demokrati komið í prosessina, og hann ræddist ikki demokratiið, tá hann stillaði upp til formansvalið.

# Sjálvstýrisflokkurin bjargaði skiftistíðini

**Hevði Sjálvstýrisflokkurin ikki tvíhildið um at hava langa skiftistíð, hevði samgongan tikið undir við at góðtikið fýra ára skiftistíð, segði Helena Dam á Neystabø í formansfrágreiðing síni á landsfundinum hjá Sjálvstýrisflokkinum í Klaksvík**

LANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*

**Klaksvík:** Undir samráðingunum úm framtíðarstøðu Føroya, vardi sjálvstýrisflokkurin longu skiftistíðina, segði Helena Dam á Neystabø í formansfrágreiðing síni.

Hevði ikki so verið, varð skiftistíðin bara fýra ár, sum hevði verið til skaða fyri føroyingar, segði hon. Tá hevði livifóturin lækkað munandi, væntaði hon.

Arbeiði við at vinna Føroyum sjálvstýri skal gerast heima í Føroyum, segði Helena Dam á Neystabø.

Vit skulu kvalifisera okkum til sjálvstýrið við at taka við ábyrgdini av øllum økjum her heima hjá okkum sjálvum. Ábyrgd og skylda skulu fylgjast, segði hon.

Fullveldisætlanin datt niðurfyri og mislukkaðist fullkomuliga. Tað eydnaðist hvørki at sannføra danir ella føroyingar um, at ætlanin var realistisk, segði Helena Dam á Neystabø. Tað kundi endað við, at samgongan legði frá sær, og tað var eisini nær við, segði hon. Men orsakað av arbeiði Sjálvstýrisfloksins helt samgongan fram.

Hóast hon varð koyrd frá sum landsstýrismaður, eydnaðist kortini Sjálvstýrisflokkinum at halda samgonguni saman, segði Helena Dam á Neystabø millum annað í formansfrágreiðing síni.

Tað var sera óheppið, tá løgmaður avlýsti fólkaatkvøðuna, sum verða skuldi í vár, segði Helena Dam á Neystabø. Sjálvstýrisflokkurin eigur ikki at helma í, fyrr enn fólkaatkvøða hevur verið. Og hon eigur helst at vera áðrenn løgtingsvalið, segði formaður sjálvsstýrisfloksins.

Arbeitt eigur at verða stigvíst fram móti sjálvrøðinum, segði Helena Dam á Neystabø. Tað fer at taka fleiri ár, men tað eigur tað so at gera. Vit skulu tøma Heimastýrislógina, til vit eru komin haðar til, at vit hava tikið við øllum skyldum sjálv.

Varð førdi politikurin hjá hesi samgonguni soleiðis førdur, hevði eingin dramatikkur verið, soleiðis sum vit hava sæð í hesum valskeiðnum, segði

Helena Dam á Neystabø í fyrstu og fyribils seinastu fromansfrágreiðing síni til landsfundin hjá Sjálvstýrisflokkinum.

# Stættarmunurin økist

**Ymsu eftirlønarskipaninar gera, at stættarmunurin millum pensiónistarnar økist. Tí má eins nýggj pensiónsskipan gerast, sigur Sámal Petur í Grund**

LANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*

**Klaksvík:** Sjálvstýrisflokkurin vil hava, at eftirlønarskipanin skal vera bæði samhaldføst og privat. Hon skal gera, at eftirlønin verður 70% av inntøkuni, pensionisturin hevur havt.

Hvussu hon skal gerast heilt konkret gjørdi hann kortini ikki greitt á landsfundinum.

Arvagranskingin skal í gongd heilt skjótt, segði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður við almanna- og heilsumálum.

Aðalstjórin í Almanna- og Heilsumálastýrinum varð uppsagdur herfyri, greiddi Samal Petur í Grund frá, og nú er rættarmál komið burtur úr tí.

Um røktarskipanina greiddi hann frá, at ein royndarskipan er í gongd á Sandi, har búfólkini á eldrabýlunum fáa útgoldið sína pensión, men so gjalda aftur til staðið, tey búgva á, heldur enn øvugt, sum vanligt er. Hendan skipanin er meira mannsømilig enn tann, har pensiónin veðru tikin frá fólki, sum so fáa lummapengar útgoldnar.

Sámal Petur í Grund harmaðist um, at aðalfundurin varð útsettur, og tí kundi eingin landsnevnd veljast heldur. Tað darvaði eisini orðaskiftinum, sum natúrliga skuldi verið á landsfundinum, segði hann.

Hann takkaði tó Helenu Dam á Neystabø fyri tíðina sum formaður í flokkinum, hóast hon framvegis formelt er formaður, til nýggjur aðalfundur hevur verið.

Eisini eftirlýsti hann størri aktiviteti millum fótfólkið, tí tað ber ikki til, at bara tey, sum standa í fremstu røð skulu mynda flokkin.

Sámal Petur í Grund undirstrikaði, at tað ber ikki til at reka politikk í Føroyum uttan at Sjálvstýrisflokkurin er við. Tað legði hann út sum tað, at floksins politikkur er tann einasti, sum ber til at reka.